# Krøv til ovnsrúm og keramikk brenniovnar

**Tað gerst meiri og meiri vanligt, at keramikk brenniovnar verða nýttir í skúlinum runt um í Føroyum. Í nógvum førum verur tað ikki givi stórt far um, at tað eru vegleiðingar um hvussu ein keramikk brenniovnur verur uppsetur í hóskandi ovnsrúmið, umframt hvussu húsast verður í samband við brúk av einum keramikk brenniovni. Vit vilja við hesi grein, lýsa krøvini til ovnsrúmið og til hvussu keramikk brenniovnin verða tryggast nýttir.**

Tað er umráðandi, at einans lærarinir sum eru royndir við at brúka brenniovnin, fáast við keramikbrenning. Saman við omanfyristandandi skal rúmið og ovnurin innrættast og brúkast eftir fylgjandi veleiðing og rakstrarreglum.

**Veleiðing fyri gerð av ovnsrúmið:**

1.1 Rýmingahurðin frá ovnsrúminum skal í einum taki kunna latast upp innanífrá í rýmingarleiðini uttan at nýta lykil ella nakað amboð.

1.2 Ovnsrúmið skal hava munadygga mekaniska luftnýggjanarskipan,
við nóg nógvari tilgongd av frískari luft. Skipanin skal vera innstillað til at útlufta til ovnurin er køldur niður til 200°C.
Undir nøkrum umstøðum kann tað vera hóskandi at uppseta ein metalljóara yvir brenniovninum, sum gjøgnum eitt rør er í
sambandi við fríska luft uttandura.

1.3 Reingerð av ovnsrúminum gerst við “vátreingerð” ella støvsúgvan við støvsúgvara við HEPA-filtur. Tað er ikki loyvt at feia ella at nýta trýstluft í rúminum.

1.4 Loft, veggir og gólv í ovnsrúminum skulu vera úr **tilfari sum ikki kann brenna**. Brenniovnurin skal uppsetast so, at hann í minsta lagi er 50 cm frá vegginum til báðar síðir og 50 cm frá baksíðuni.
Frá yvirkanti á brenniovninum og uppundir loftið skal í minsta lagi
vera 100 cm. Frammanfyri brenniovnin skal plássið í minsta lagi vera 100 cm.



© BRL 2004

**Krøv til uppsetan av keramikk brenniovni og til ovnsrúmið.**

1.5 Um veggir, loft og gólv í ovnsrúminum eru **gjørd úr brennbarum tifari**. So skal brenniovnurin setast so, at hann er í minsta lagi 55-60 cm frá vegginum til báðar síðir og 55-60 cm frá baksíðuni. Frá yvirkanti á brenniovninum og uppundir loftið skal í minsta lagi vera 105-110 cm. Frammanfyri brenniovnin skal plássið í minsta lagi vera 100 cm.
Verjuplátur, sum bæði eru hitatálmandi og hitahaldgóðar, skulu uppsetast.
Pláturnar skulu standa 30 cm útum ovnin umframt dekka alla víddina á brenniovninum. Pláturnar mugu ikki uppsetast beinleiðis á veggin, loftið ella á gólvið. Pláturnar skulu uppsetast við einum fráleika frá tí tilfarðinum sum kann brenna uppá 5-10 cm, so at luft kann fara ímillum plátuna og húsalutin.

**Rakstrarreglur fyri keramikk brenniovnar:**

2.1 Ovnar skulu standa inni í læstum ovnsrúmi, undirvísing má ikki vera í rúminum, og tilfar sum kann brenna má heldur ikki goymast inni í sjálvum ovnsrúminum.

2.2 Ovnshurðin skal ikki latast upp, fyrr enn ovnurin er kaldur. Tað skal ikki vera møguligt at lata ovnshurðina upp meðan streymur stendur til ovnin. Høvuðsavbrótari við lykli skal vera framman á ovninum ella næst ovninum. Eisini skal ein sjálvvirkandi hurðakontakt vera á ovninum, sum brýtur streymin av tá hurðin verður latin upp.




**Ein keramik brenniovnur sum ikki er uppsetur eftur vegleiðingini.**

2.3 Fólk ið taka úr ovninum, seta í hann ella reingera, skulu hava filturmasku.

2.4 Tað er umráðandi at ovnurin stendur vatnrætt.

BRL/BHJ 2004